# Bókadeild Føroya Lærarafelags fyllir 50 ár

**Bókadeild Føroya Lærarafelags fyllir 50 ár í næstu viku. Hetta verður hátíðarhildið við fleiri tiltøkum og vitjan frá útlendskum rithøvundum**

HÁTÍÐARDAGUR
*Heini S. Kristiansen*
*Petur Meinhard Magnussen*
*& Beinta K. Jacobsen - praktikantar*
*heinik@sosialurin.fo*



*Starvsfólkini í Bókadeild Føroya Lærarafelags eru í góðum lag, nú bókadeildin skjótt hevur 50 ár á baki. Frá vinstru: Marna Jacobsen, forlagsfólk, Turið Kjølbro, blaðstjóri á skúlablaðnum, Niels Jákup Thomsen, leiðari á bókadeildini og Beinta Johannessen, blaðstjóri á Strok*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá ið Bókadeildin varð sett á stovn í 1956, stóð ikki væl til við føroyskum bókum. Á aðalfundinum hjá lærarafelagnum varð samtykt at seta eitt forlag á stovn. Síðani hevur Bókadeildin givið meira enn 1000 bøkur út. Umframt tað eru eisini aðrar útgávur sum Skúlablaðið og Barnablaðið.

Starvsfólkini á Bókadeildini hava valt at markera dagin við nøkrum tiltøkum fyri fólk í øllum aldri. Hóskvøldið 28. september verður hátíðarhald í Norðurlandahúsinum, har Erhard Jacobsen fer at halda fyrilestur. Á skránni verður eisini ungdómstiltak við luttøku frá bólkinum The Dreams og Meyla og Knøttur við sjónleikinum „Lort í býin".

Fríggjadagin hevur Bókadeild Føroylærarafelags bjóðað næmingum úr øllum landinum til Norðurlandahúsið, har tey fáa høvi til at hitta nordurlendskar rithøvundar, og seta teimum spurningar. Fríggjakvøldið verður bókmentaskeið. Hátíðarhaldið er fyri bæði stór og smá.

Útlendsku rithøvundarnir, sum koma á vitjan, fara at halda fyrilestrar og fara at tosa við skúlaungdóm. Serliga stuttligt er tað hjá børnunum um at sleppa at heilsa uppá rithøvundarnar og spyrja teir spurningar. Tað verða um 900 skúlanæmingar, sum koma at vitja í Norðurlandahúsinum 29. september.

### Rithøvundarnir:

Mecka Lind er ein svenskur rithøvundur, sum er fødd í 1942.

Hon vaks upp hjá ommu síni í Lund. Omman dugdi sera væl at siga frá søgum, og hon var ein stórur stuðul hjá Mecku og var við til at menna hennara hugflog og skapanarevni.

Mecka arbeiddi við lýsingum í tíggju ár eftir at hava gingið í realskúla. Síðani hevur hon verið ferðaleiðari, frítíðarleiðari og free-lance høvundur.

Tá ið hon gav fyrstu bók sína út í 1982, gjørdist hon høvundur burturav.

Kendast er hon fyri bøkurnar um børn, sum hava eitt strævið lív, sum liva á gøtuni og eru barnasoldátar.

Bøkur hennara eru týddar til nógv mál og hava fingið fleiri heiðurslønir í útlondum.

Lene Kaaberbøl er donskur rithøvundur, fødd í Keypmannahavn í 1960.

Hon er útbúgvin cand. mag. í enskum og dramaturgi. Hon hevur fyrr starvast sum studentaskúlalærari, lýsingatekstahøvundur, týðari og forlagsfólk. Nú starvast hon í egnu fyritøku síni Phabel & Plott.

Tær fýra Skammarabøkurnar eru millum mest seldu í Norðurlondum. Tær eru seldar í fimtan londum, og Lene hevur sjálv týtt tær til enskt.

Ragnheiður Gestsdóttir er íslendskur rithøvundur og myndprýðari, fødd í Hafnafirði í 1953.

Longu 19 ára gomul tók hon læraraprógv. Síðani las hon bókmentafrøði við lærda háskúlan í Reykjavík og listsøgu í Århus.

Afturkomin til Reykjavíkar fór hon aftur at lesa bókmentafrøði og varð spakuliga drigin inn í arbeiðið at myndprýða og skriva.

Hon hevur eisini arbeitt sum lærari og skúlabókavørður og verið ritstjóri á forlagi, sum gevur út undirvísingartilfar til grundskúlan.

Hon hevur skrivað og myndprýtt fleiri enn tjúgu bøkur og hevur fingið nógvar heiðursløn ir í heimlandi sínum.

Ulf Stark er svenskur rithøvundur, føddur í 1944 og vaks upp í Stureby, sunnan fyri Stokkhólm. Hann skrivaði sítt fyrsta yrkingasavn 19 ára gamal.

Hevur arbeitt við mentanartilfari á blaðnum Expressen og sum starvsfólkaundirvísari í Arbeiðs marknaðarstýrinum.

Bókmentaliga frambrotið byrjaði av álvara, tá ið hann gav bókina Dárar og Deydur út í 1984.

Bøkurnar um Ulf og vinmannin Percy er ein øðrvísi háttur at skriva ævisøgu, har hann brúkar navnið, men finnur uppá hendingarnar. Lygnin hevur við tað skapandi at gera, sigur Ulf Stark, orðið eitt slag av legokubbum, sum tú kanst brúka at byggja og skapa veruleikar við.

Rakel Helmsdal er føroyskur rithøvundur, fødd 25. september 1966 í Tårnby á Amager.

Hevur búð meginpartin av sínum lívi í Havn. Tó hevur hon verið 5 ár í Frankaríki, og har skrivaði hon fýra av bókum sínum. Rakel Helmsdal hevur umframt at skriva bøkur eisini undirvíst øðrum í kreativari skriving, hevur undirvíst í drama og skrivað og sett upp leikir saman við ungdómi. Hon er verkætlanarleiðari fyri tiltakinum Ung í Føroyum.

Sólrún Michelsen er føroyskur rithøvundur, fødd 1948 á Argjum.

Eftir at hava tikið realprógv hevur hon arbeitt á skrivstovu. Síðani settu maðurin og hon á stovn heilsølu, og har virkar hon nú sum fyrisitingarleiðari. Umframt at skriva barna- og ungdómsbøkur, hevur Sólrún eisini skrivað yrkingar og lættlesibøkur til tey yngstu børnini í fólkaskúlanum.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




## INFORMASJÓNSSTARV Á HAGSTOVUNI

EIN HEIMASÍÐA VIÐ INFORMASJÓN UM ALT SAMFELAGIÐ - ER TAÐ NAKAÐ FYRI TEG?

Hagstovan sóknast eftir einum fólki, sum skal vera við til at útgeva hagtøl og informasjón um samfelagið á heimasíðuni hjá okkum www.hagstova.fo. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til eitt ár, við møguleika til at gerast varandi starv.

Vit hava eina heila lítla organisasjón til at framleiða og savna hagtøl um eitt breitt úrval av viðurskiftum, sum hava týdning fyri øll. Uppgávan er at geva informasjónini eitt snið ella skap, sum kann gera turr hagtøl áhugaverd, lesiverd og atkomulig hjá øllum.
Hevur tú áhuga í hagtølum, áhuga í informasjón sum heild, hevur tú evnini til at siga eina søgu í tølum og texti, ella roy ndir av at arbeiða við heimasíðuforritum av ymsum slag, ert tú vælkomin at søkja starvið. Hevur tú útbúgving sum miðlagrafikari ella aðra viðkomandi miðlaútbúgving, er tað ein avgerandi fyrimunur. Royndir í líknandi størvum telja sjálvsagt eisini við í metingina.

Tú kemur at starvast í einari organisasjón, sum hevur til uppgávu at upplýsa um samfelags-viðurskifti sum heild og sum er snikkað til at loysa júst tað uppgávuna. Títt íkast verður at gera hesa informasjón tøka á internetinum við fleiri ymsum amboðum og tillaga ymiskan lesaratørv.
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu stílast til Hagstovu Føroya, Glyvursvegur 1, 165-Argir, ella sendast við telduposti til hagstova@hagstova.fo. Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 20. septembur og byrjast skal í starvinum skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, ber til at venda sær til Hermann Oskarsson á Hagstovuni, tlf. 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO